KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000 . Fax. 410001

# Klaksvíkar Býráð

**Dagfesting:** 25.01.2024 kl. 17:30
**Málnr.:** 21/01365 Gerðabók
**Nevndarlimir:** Karl Johansen, Atli S. Justinussen, Jógvan Skorheim, Gunvá við Keldu, Oddmar á Lakjuni, Jóhanna Christiansen, Eyðstein Ó. Poulsen, Óli M. Lassen, Signhild V. Johannesen, Tummas J. Lervig og Annika S. Biskopstø
**Varalimir:**
**Ikki møtt:**
**Onnur:** Rúni Rasmussen, kommunustjóri
**Protokollførari:** Jensa Anthoniussen, fulltrúi

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til viðgerðar** | | |
| 1/24 | 23/01326-2 | Umsókn um sundurbýti (marknaumskipan) millum matr.nr. 28 og 11 á Syðradali |
| 2/24 | 23/01388-4 | Sundurbýti av matr.nr. 829a í Klaksvík |
| 3/24 | 23/01382-2 | Marknaumskipan millum matr.nr. 641a og 641c í Klaksvík |
| 4/24 | 24/00034-2 | Dagføring av sethúsum á matr.nr. 442, Akursmørk |
| 5/24 | 22/00023-2 | Umsókn um víðkan av leigulendi til landstøðina á Borðoyavík |
| 6/24 | 23/01294-12 | Dagstovnaloysn á Kalsoynni (Húsar) |
| 7/24 | 24/00036-2 | Íløgujáttan til Varpið – *eykajáttan, fyrra viðgerð* |
| 8/24 | 23/01081-6 | Leigusáttmáli til Klaksvíkar Róðrarfelag |
| 9/24 | 22/01562-45 | Sáttmáli millum Sp/f matr nr. 986a (Sp/f nr. 7748) og Klaksvíkar kommunu viðv. byggibúning av økinum kring hotellið. |
| 10/24 | 21/01280-248 | Heimild at brúka inntøkur av sølu – *eykajáttan, seinna viðgerð* |

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000 . Fax. 410001

**Til viðgerðar**

## 1/24
## 23/01326-2 Umsókn um sundurbýti (marknaumskipan) millum matr.nr. 28 og 11 á Syðradali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Syðradalsnevndin | 29.11.2023 | 11/23 |
| 2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 15.01.2024 | 3/24 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 25.01.2024 | 1/24 |

**23/01326-2 Umsókn um sundurbýti (marknaumskipan) millum matr.nr. 28 og 11 á Syðradali**

**Frágreiðing um málið:**
Umhvørvisstovan biður um kommununnar ummæli til umsókn um sundurbýti/marknaumskipan millum matr.nr. 11 og 28 á Syðradali.
Endamálið við umskipanini er at fáa stykkini eins stór, - soleiðis sum tað sambært umsóknini var upprunaætlanin.

Byggisamtyktarliga liggja báðir matriklarnir í øki K við ásetingini: Landbúnaður.

**Burðardygd og heimsmálini:**
-

**Lógargrundarlag:**
Matrikulógin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar – kommunan bert ummælandi

**Tilmæli:**
Tekniska Fyrisiting mælir til at taka undir við umsóknini, tó við teirri viðmerking/kunning, at uml. 88 $m^2$ eru tinglisnir sum ferðslurættur á matr.nr. 28.

**Syðradalsnevndin 29. november 2023:**
Nevndin tekur undir við tilmæli dagf. 13-11-2023.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 15. januar 2024:**
Nevndin tekur undir við Syðradalsnevndini 29-11-2023.

**Klaksvíkar Býráð 25. januar 2024:**
Tilmælið frá UBN 15-01-2024 einmælt samtykt.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000 . Fax. 410001

## 2/24
## 23/01388-4 Sundurbýti av matr.nr. 829a í Klaksvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 15.01.2024 | 4/24 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 25.01.2024 | 2/24 |

**23/01388-4 Sundurbýti av matr.nr. 829a í Klaksvík**

**Frágreiðing um málið:**
Umhvørvisstovan biður um kommununnar ummæli til

- sundurbýti av matr.nr. 829a, soleiðis at 2.364 $m^2$ av lutinum á Fossum verður frábýttur til sjálvstøðugan matrikul (luturin á Fossum er 2964 $m^2$). Endamálið við umsóknini er at selja teir 2364 $m^2$ til matr.nr. 787a
- uttangarðsjørðin verður frábýtt matr.nr. 829a og eftirfylgjandi samanløgd við matr.nr 787a

Tekniska Umsiting hevur spurt umsøkjaran, hví biðið verður um, at 600 $m^2$ vera eftir av lutinum á Fossum. Til tað upplýsir umsøkjarin, at kravið frá Umhvørvisstovuni er, at eftirverandi vídd av inngarðsgarðsjørðini hjá matr.nr. 829a skal verða minst 5000 $m^2$. Við søluni av lutinum á Fossum koma 600 $m^2$ av vanta í hjá matr.nr. 829a at uppfylla kravið um 5000 $m^2$ innangarðsvídd – tí verður hendan víddin ikki seld við.

**Burðardygd og heimsmálini:**
-

**Lógargrundarlag:**
Matrikulógin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar – kommunan ber tilmælandi

**Tilmæli:**
Tekniska Umsiting mælir til at viðmæla umsóknini – tó við teirri viðmerking, at kommunan helst sær, at parturin á Fossum verður frábýttur sum ein heilur lutur, um møguleiki er fyri hesum.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 15. januar 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 08-01-2024.

**Klaksvíkar Býráð 25. januar 2024:**
Tilmælið frá UBN 15-01-2024 einmælt samtykt.

# 3/24
# 23/01382-2 Marknaumskipan millum matr.nr. 641a og 641c í Klaksvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 15.01.2024 | 5/24 |
| 2 Tekniska Nevnd | 17.01.2024 | K-3/24 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 25.01.2024 | 3/24 |

**23/01382-2 Marknaumskipan millum matr.nr. 641a og 641c í Klaksvík**

**Frágreiðing um málið:**
Umhvørvisstovan biður um kommununnar ummæli til marknaumskipan millum matr.nr. 641a og 641c í Klaksvík.
Umskipanin ber í sær, at teir uml. 375 m$^2$ framvið eysturmarkinum av matr.nr. 641a verða fluttir til matr.nr. 641c. Á umrødda lendinum liggur frammanundan servituttur um ferðslurætt.
Við umskipanini kemur ognin, matr.nr. 641c, at marka beinleiðis til almennan veg (Karlsveg).

**Burðardygd og heimsmálini:**
Nr. 11 – Burðardyggir býir og býlingar

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg um matrikulering og sundurbýti v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar – kommunan bert ummælandi partur

**Tilmæli:**
Tekniska Umsiting staðfestir, at verandi atkoma hjá matr.nr. 641c liggur vestanfyri sethúsini á matr.nr. 641a, har tó bert partur av strekkinum er servituttbundin við almennum ferðslurætti. Sunnastu 13-14 metrarnir av hesum strekki eru uttan tinglisnan ferðslurætt.
Við omanfyri nevnda í huga verður mælt til at viðmæla umsóknini.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 15. januar 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 05-01-2024.

**Tekniska Nevnd 17. januar 2024:**
Tilmælið, dagf. 05-01-2024, verið til kunningur.

**Klaksvíkar Býráð 25. januar 2024:**
Tilmælið frá UBN 15-01-2024 einmælt samtykt.

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000 . Fax. 410001

## 4/24
## 24/00034-2 Dagføring av sethúsum á matr.nr. 442

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 15.01.2024 | 9/24 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 25.01.2024 | 4/24 |

**24/00034-2 Dagføring av sethúsum á matr.nr. 442, Akursmørk**

**Frágreiðing um málið:**
NÝRÚM søkir vegna eigararnar av matr.nr. 442 um loyvi at dagføra húsið, og er ætlanin at gera eina íbúð á hvørjari hædd. Um umsóknin skal gangast á møti, er neyðugt við einum fráviki, tí ognin liggur í D-øki.

Gamla sniðið og takkonstruktiónin verður varðveitt.

Ætlanin er eisini at fáa eina altan á húsið frá miðhædd og ein tilbygning á 9 $m^2$ í kjallarahædd og miðhædd.

Tað eru nokk av parkeringsplássum inni á grundøkinum.

**Burðardygd og heimsmálini:**
Nr. 11

**Lógargrundarlag:**
D9 - Grønt øki - Park og náttúruøki

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Um umsóknin ikki verður gingin á møti, kann umsøkjarin gera brúk av §15 í lógini um býarskipanir og byggisamtyktir.

**Tilmæli:**
Býarskipanarbólkurin hevur umrøtt umsóknina at dagføra húsið, ið liggur í grønum øki D9.

Tá ið byggisamtyktin bleiv gjørd, kom ognin at liggja í grønum øki, og sambært Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir, sigur § 15, at missir ognin møguleikan at nýta teir fyrimunir, ið økið hevur á rímiligan og forsvarligan hátt sammett við, hvussu grannaøkini í roynd verða nýtt, kann ognarmaður krevja, at kommunan skal taka økið fyri endurgjald. Hetta hevur ongantíð verið aktuelt.




Verandi ásetingar fyri økið loyva ikki bygging, men av tí at talan er, at núverandi lógliga bygging verður varðveitt og dagførd, so tey eru hóskilig til nútímans nýtslu sum sethús, verður mælt til at geva loyvi.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 15. januar 2024:**
Nevndin tekur í prinsippinum undir við tilmælinum, dagf. 05-01-2024, men heitir á umsitingina um at upplýsa um líknandi viðgerðir í økinum áðrenn býráðsfundin.

**Klaksvíkar Býráð 25. januar 2024:**
Tilmælið frá umsitingini, dagf. 05-01-2024, einmælt samtykt.

## 5/24
## 22/00023-2 Umsókn um víðkan av leigulendi til landstøðina á Borðoyarvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 17.01.2022 | K-6/22 |
| 2 Havna- og Vinnunevndin | 19.01.2022 | 2/22 |
| 3 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 15.01.2024 | K-5/24 |
| 4 Havna- og Vinnunevndin | 17.01.2024 | 1/24 |
| 5 Fíggjarnevndin | 23.01.2024 | 3/24 |
| 6 Klaksvíkar Býráð | 25.01.2024 | 5/24 |

**22/00023-2 Umsókn um víðkan av leigulendi til landstøðina á Borðoyarvík**

**Frágreiðing um málið:**
Bakkafrost leigar í løtuni eitt lendi frá Klaksvíkar Havn á Borðoyarvík til landstøð. Ávís matrikulviðurskifti í samband við verandi øki hjá Bakkafrosti verða enn avgreidd, men nú hevur felagið sent umsókn til kommununa um at víðka leigulendið nakað fyri at kunna gera ein betri súrløgubrunn í økinum.

Tað er avmarkað, hvør nýtsla kann verða av økinum fyri onnur enn Bakkafrost, og tí verður mælt til at ganga umsóknini um víðkan av lendinum á møti. Av tí at tað eru ávís matrikulviðurskifti viðvíkjandi

leigusáttmálanum fyri lendið sum heild, sum ikki eru avgreidd, kann tað gera málið enn greiðari, at alt tað samlaða økið verður tikið við, tá nýggi leigusáttmálin verður gjørdur.

Byggifulltrúin hevur upplýst, at sjálv byggingin kann uppfylla tær treytir, sum eru fyri økið, og tí verður tann parturin ikki lagdur fyri nevndirnar, tá byggingin í størstan mun er treytað av atgongdini til økið.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Talan verður um eina árliga inntøku til Klaksvíkar Havn á umleið kr 1.000 um árið.

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at nevndir og býráð taka undir við víðkanini av økinum, og at hetta økið verður tikið uppí, tá samlaði sáttmálin verður dagførdur.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 17. januar 2022:**
Málið verið til kunningar.

**Havna- og Vinnunevndin 19. januar 2022:**
Málið tikið av skrá.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 15. januar 2024:**
Málið verið til kunningar.

**Havna- og Vinnunevndin 17. januar 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 11-01-2022.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2024:**
Nevndin tekur undir við HaVN 17-01-2024.

**Klaksvíkar Býráð 25. januar 2024:**
Tilmælið frá FíN 23-01-2024 einmælt samtykt.

## 6/24
## 23/01294-12 Dagstovnaloysn á Kalsoynni (Húsar)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung | 16.01.2024 | 6/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.01.2024 | 8/24 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 25.01.2024 | 6/24 |

**23/01294-12 Dagstovnaloysn á Kalsoynni (Húsar)**

**Frágreiðing um málið:**
Víst verður til skriv frá umsitingini, dagf. 8. januar 2024, sum greiðir nærri frá málinum.

Arbeitt hevur verið við loysnum á dagstovnatilboði í Kalsoy. Saman við Bygdarfelagnum Sigursglæman á Húsum er komið fram til eina loysn, sum mett verður, er nøktandi. Skotið verður upp, at gera 10 ára

leigusáttmála millum kommununa og bygdarfelagið um miðhædd og ovastu hædd í bygdarhúsinum á Húsum at taka við 1. feb. 2024.

Arbeiðið við at gera hølini klár gongur væl, og verður roknað við, at dagstovnurin á Húsum kann lata upp um hálvan februar.
Størvini á dagstovninum eru lýst leys og sett. Barnaansingarsamskiparin verður sjálvur yvirskipað leiðsla fyri dagstovnin.

**Burðardygd og heimsmálini:**
-

**Lógargrundarlag:**
Dagstovnalógin:
§ 3. Kommunan kann geva børnum, sum búgva í kommununi, tilboð um pláss á dagstovni og dagrøkt og hevur ábyrgdina fyri virkseminum. Dagstovnur sambært hesi lóg er vøggustova, barnagarður, frítíðarheim o.a. Dagrøkt sambært hesi lóg er ansing av børnum í heiminum og á spælistovum.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Við at gera eina leiguavtalu við bygdarfelagið á Húsum sleppur kommunan undan íløguni í bygningin. Tó skal útiøkið dagførast. Hetta er nakað, sum kommunan í stóran mun kortini skuldi gera sum eigari av hesum spæliplássi og sparkivølli.
Árligi raksturin av dagstovninum er ikki endaliga settur upp enn. Hetta verður nærri lýst seinni.

**Tilmæli:**
Vísandi til samtyktu heimildina frá Trivnaðarnevndini børn & ung og frá Fíggjarnevndini í november 2023, verður mælt nevndum og býráð til at taka undir við hesi uppskotnu dagstovnsloysn fyri Kalsoynna í bygdarhúsinum á Húsum, so sum útgreinað í hesum tilmæli og viðfestu skjølum.

**Trivnaðarnevndin Børn og Ung 16. januar 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagfest 08-01-2024.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2024:**
Nevndin tekur undir við B&U 16-01-2024.

**Klaksvíkar Býráð 25. januar 2024:**
Tilmælið frá FíN 23-01-2024 einmælt samtykt.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000 . Fax. 410001

## 7/24
## 24/00036-2 Íløgujáttan til Varpið – *eykajáttan, fyrra viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 16.01.2024 | 1/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.01.2024 | 1/24 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 25.01.2024 | 7/24 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 22.02.2024 | |

**24/00036-2 Íløgujáttan til Varpið**

**Frágreiðing um málið:**
Grunnurin Mentanarhúsið hevur latið inn umsókn um íløgustuðul uppá kr. 5. mill. Hesin stuðul skuldi eftir ætlan fáast til vega frá Fíggjarnevnd Løgtingsins, men fíggjarnevndin játtaði ongan pening til Varpið í 2024.
Tískil manglar verkætlanin nú hesa fígging til at gjalda komandi rokningar fyri arbeiði at gera bygningin lidnan.
Eftir ætlan skal bygningurin yvirtakast 31.01.2024.

**Burðardygd og heimsmálini:**

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Um stuðulin skal veitast til Mentanarhúsið, skulu kr. 5. mill. flytast frá aðrari íløgu og/ella fremjast sum ein eykajáttan.

**Tilmæli:**
Mælt verður til at nevndin tekur støðu til málið.

**Mentanarnevndin 16. januar 2024:**
Nevndin tekur undir við, at 3 mió.kr. verða latnar Mentanarhúsinum í íløgustuðuli; peningurin verður at játta av *tøkum peningi.*

**Fíggjarnevndin 23. januar 2024:**
Nevndin tekur undir við MeN 16-01-2024.

**Klaksvíkar Býráð 25. januar 2024:**
Tilmælið frá FíN 23-01-2024 einmælt samtykt.

## 8/24
## 23/01081-6 Leigusáttmáli til Klaksvíkar Róðrarfelag

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 16.01.2024 | 2/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.01.2024 | 2/24 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 25.01.2024 | 8/24 |

**23/01081-6 Leigusáttmáli til Klaksvíkar Róðrarfelag**

**Frágreiðing um málið:**
Klaksvíkar Kommuna hevur bygt nýtt róðrarneyst, ið Klaksvíkar Róðrarfelag nýtir, og í hesum sambandi er gjørdur ein leigusáttmáli millum kommununa og Róðrarfelagið um nýtslurættin til kappróðrarneystið. Fyrisitingin hevur saman við borgarstjóranum gjørt ein nýggjan leigusáttmála við gamla leigusáttmálanum sum grundarlag og hevur samráðst við nevndina í Róðrarfelagnum um innihaldið. Báðir partar vóru samdir um innihaldið í sáttmálanum og hava skrivað undir sáttmálan.
Av misgáum var sáttmálin ikki lagdur fyri nevndir og býráð, áðrenn hann var undirskrivaður, og tí verður hann nú lagdur fyri til staðfestingar.

**Burðardygd og heimsmálini:**
Heimsmál nr. 3 at tryggja øllum heilsugott lív og virka fyri trivnaði fyri øll í øllum aldri

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar.

**Tilmæli:**
Við hesum vil Fyrisitingin fáa nevndina at staðfesta sáttmálan.

**Mentanarnevndin 16. januar 2024:**
Nevndin staðfestir sáttmálan millum Klaksvíkar kommunu og Klaksvíkar Róðrarfelag, vísandi til tilmælið dagf. 08-01-2024.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2024:**
Nevndin tekur undir við MeN 16-01-2024.

**Klaksvíkar Býráð 25. januar 2024:**
Einmælt samtykt at staðfesta sáttmálan millum Klaksvíkar kommunu og Klaksvíkar Róðrarfelag.

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000 . Fax. 410001

# 9/24
# 22/01562-45 Sáttmáli millum Sp/f matr nr. 986a (Sp/f nr. 7748) og Klaksvíkar kommunu viðv. byggibúning av økinum kring hotellið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 15.01.2024 | 2/24 |
| 2 Havna- og Vinnunevndin | 17.01.2024 | K-2/24 |
| 3 Tekniska Nevnd | 17.01.2024 | K-2/24 |
| 4 Fíggjarnevndin | 23.01.2024 | 4/24 |
| 5 Klaksvíkar Býráð | 25.01.2024 | 9/24 |

**22/01562-45 Sáttmáli millum Sp/f matr.nr. 986a (Sp/f nr. 7748) og Klaksvíkar kommunu viðv. byggibúning av økinum kring hotellið**

**Frágreiðing um málið:**
Klaksvíkar býráð samtykti á fundi 23. februar 2023 at geva umsitingin heimild at orða ein sáttmála og gjaldsavtalu áljóðandi 19,2 mió. kr. u/mvg við felagið, sum skal byggja hotell í Klaksvík.
Eisini varð nevnt í samtyktini, at endaligt sáttmálauppskot verður lagt fyri Klaksvíkar býráð til góðkenning.
Fyrisitingin hevur móttikið uppskott uppá sáttmála, sí fylgiskjal.
Samráðingar um onkrar orðingar eru í gongd, men yvirskipað verður innihaldið í sáttmálanum óbroytt.

**Lógargrundarlag:**
ABT93

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Sáttmálin er áljóðandi 19,2 mió. kr. uttan mvg. Sambært viðløgdu gjaldsætlan skulu 9,5 mió kr. brúkast í 2024.
Klaksvíkar kommuna hevur sett 4 mió. kr. av á fíggjarætlanini fyri 2024, við tí fortreyt at restuppphæddin frá 2023 skal flytast fram. Upphæddin, sum kann flytast fram, er 3,5 mió. kr.
Tað við siga, at játtanin fyri 2024 samlað verður 7,5 mió. kr. Hetta er nakað, sum má takast upp saman við felagnum, sum byggir hotellið.

**Tilmæli:**
Biðið verður um heimild at skriva undir fyriliggjandi sáttmála, tá man er komin á mál við samráðingunum.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 15. januar 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 08-01-2024.

**Havna- og Vinnunevndin 17. januar 2024:**
Tilmælið, dagf. 08-01-2024, verið til kunningar.

**Tekniska Nevnd 17. januar 2024:**
Tilmælið, dagf. 08-01-2024, verið til kunningar.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2024:**
Nevndin tekur undir við UBN 15-01-2024.

**Klaksvíkar Býráð 25. januar 2024:**
Tilmælið frá FíN 23-01-2024 einmælt samtykt.

## 10/24
## 21/01280-248 Heimild at brúka inntøkur av sølu – *eykajáttan, seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 07.12.2023 | 115/23 |
| 2 Fíggjarnevndin | 07.12.2023 | 100/23 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 07.12.2023 | 101/23 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 25.01.2024 | 10/24 |

**21/01280-248 Heimild at brúka inntøkur av sølu**

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 7. des. 2023.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ein varlig meting sigur, at Klaksvíkar kommuna í inniverandi ári [2023] fær uml. 8 mió. kr. inn í samband við grundstykkjasølu á Fossum.
Mett verður, at fíggjarligi tørvurin í 2023 verður uml. 16 mió. kr., tí er neyðugt, at Klaksvíkar býráð heimilar, at 6 mió. kr. av inntøkunum í samband við grundstykkjasølu á Fossum verða nýttar til at fremja verkætlanina.

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at Klaksvíkar býráð heimilar, at 6 mió. kr. av inntøkunum í samband við grundstykkjasøluna á Fossum verða nýttar til at fremja verkætlanina.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 7. desember 2023:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 04-12-2023.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2023:**
Nevndin tekur undir við UBN 07-12-2023

**Klaksvíkar Býráð 7. desember 2023:**
Tilmælið frá FíN 07-12-2023 einmælt samtykt.

**Klaksvíkar Býráð 25. januar 2024:**
Tilmælið frá Býráðnum 07-12-2023 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

Fundurin lokin kl. 18:45